

ÍBLÁSTUR

*- Eg elski at ganga túrar og fari gjarna tvær ferðir um dagin oman í býin. Mær dámar væl at hitta fólk og práta, og tað er ofta á slíkum túrum, eg fái íblástur til tað, eg skrivi – og nú yrki, sigur Elin Mortensen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# – Tími ikki at stúra meg út á sjógv

**NÍTI ÁR** - Eg livi dagin í dag. Dagurin í gjár er farin, og morgindagin veitst tú einki um. Við trúnni á Guð er ikki neyðugt at stúra, sigur Elin Mortensen, fyrrverandi lærari og rithøvundur, sum í dag fyllir níti ár

Vilmund Jacobsen

Í dag fyllir Elin Mortensen (Elin Henrietta Elisabeth Mortensen) níti ár.

Umframt at hava verið lærari í mong ár við Sankta Frans Skúla í Havn, hevur Elin eisini skrivað fleiri bøkur, sum vit fara at venda aftur til aðrastaðni á hesi opnu.

Nú stóri dagur hennara er í dag, skipaði Bókadeild Føroya Lærarafelags fyri tíðindafundi í Sankta Frans Skúla tíðliga seinnapartin, har ein av bókum hennara, *Barn undir krígnum*, sum nú er komin í nýggjari útgávu, varð løgd fram.

Tað er Bókadeild Føroya Lærarafelags, sum gevur bókina útaftur fyri at heiðra høvundan. Bókin kom út fyri 20 árum síðan og hevur leingi verið útseld.

Í fororðunum sigur bókadeildin, at krígstíðin var ein týdningarmikil partur av søgu okkara, og nú sjeyti ár eru liðin, síðan bretar komu higar at verja okkara land, er føðingardagurin hjá Elini eitt gott høvi til nýggju útgávuna av bókini, sum lýsir hetta tíðarskeið við gleði og sorg.

Bókin, sum kemur út í dag, er hin sama í innihaldi, men onkrar myndir eru komnar aftrat teimum, sum vóru í fyrru útgávuni.

Orsøkin til, at Elin Mortensen av fyrstan tíð fór undir at skriva *Barn undir krígnum*, var, at einki hevur verið fest á blað um, hvussu tað var at vera barn í Føroyum undir seinna heimsbardaga. Høvundurin hevur sagt seg vónað, at bókin fór at geva fólki eina hóming av, hvussu tað var at vera barn í krígstíð.

Úr rúgvuni av tilfari, sum Elin hevur latið úr hondum, er eisini *Heimbygd mín Tvøroyri* og *Sanna og Marjun*.

Á tíðindafundinum í dag, sum var eftir evsta mark hjá Sosialinum, skuldu næmingar úr Sankta Frans Skúla eisini framføra brot úr bókini *Barn undir krígnum*, eins og skipað varð fyri powerpointframløgu við árinum 1920 og samandrátti av lívinum hjá høvundanum.

## Fór at yrkja

Sosialurin hitti Elina Mortensen í telefonini týskvøldið fyri stóra føðingardagin.

Undirritaði kennir bara navnið á fyrrverandi læraranum og høvundanum, sum hevur verið so virkin og hevur avrikað so nógv, men ikki persónin, tó at tað eru mong, sum kenna hana – ikki minst tey, sum hava starvast saman við henni og hava havt hana sum lærara.

Tá vit ringja, er ein blíð, sera fryntlig og væluppløgd kvinna í hinum endanum, og í telefonini ljóðar hon als ikki, sum nøkur gomul kona, sum fyllir níti, tá farið er um midnáttina.

Tvøturímóti.

Áðrenn samrøðan veruliga byrjar, kenni eg meg næstan noyddan at kekka, at hetta er rætta viðkomandi. Eg minni hana á, at næmingar á Heilsuskúla Føroya nýliga hava skrivað uppgávu um eina av bókum hennara og seinni eisini sendu henni tað, tey fingu burtur úr.

- Jú, tað er rætt. Næmingarnir sendu mær tað, tær høvdu skrivað, og eg eri sera fegin um, at onkrar av bókum mínum soleiðis kunnu brúkast í undirvísing.

Og nú var als eingin ivi longur.

Í hinum endanum er ein árvakin kvinna, sum hóast høga aldurin framvegis er púra klár, virkin og tekur dagin, soleiðis sum hann kemur.

Nú dagurin hjá Elini er í dag, skilst, at Sprotin eisini fer at geva út eitt yrkingarsavn hjá henni.

- Jú, eg havi skilt, at yrkingasavnið *Smáputl* fer at koma út nú. Eg havi skilt á Jonhardi Mikkelsen, sum stendur aftanfyri forlagið, at ein ávísur dagur í mai er valdur sum útkomudagur, og tað kann væl vera, at hetta er í morgin, sigur hon.

Elin Mortensen vísir á, at hon hevur yrkt í nøkur ár, og hon hevur serliga fingist við at yrkja, síðan eyguni fóru at bila.

- Tá eyguni fóru at bila, fekk eg ikki so væl skrivað nakað serligt longur. Nú skrivi eg yrkingar við einum tusjpenni, og síðan fái eg